Kommunufelagið

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Dagfesting
17. desember 2017

Okkara j.nr.
17/03813-3

Málsviðgeri
Jóhan J. Lamhauge

Tygara j.nr.17/00835-1

**Viðv.: broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt (Dagstovnaráð og avtøka av kærurætti)**

Kommunufelagið skal herviða koma við viðmerkingum til omanfyri nevnda uppskot, sum er sent felagnum til hoyringar.

**Viðvíkjandi skipan av Dagstovnaráði:**

Kommunufelagið tekur undir við, at eitt dagstovnaráð verður skipað, ið hevur til endamáls at veita kommununum ráðgeving og vegleiðing í námsfrøðiligum spurningum. Somuleiðis tekur Kommunufelagið undir við, at Kommunufelagið er skrivstova Dagstovnaráðsins.

Sambært galdandi dagstovnalóg veitir landsstýrismaðurin kommununum ráðgeving og vegleiðing í námsfrøðiligum spurningum. Uppgávan hjá ætlaða Dagstovnaráðnum verður at ráðgeva og vegleiða kommunum í námsfrøðiligum spurningum. Her verður serliga hugsað um, hvussu endamálið við dagstovnalógini - við framhaldandi at menna, menta og hava umsorgan fyri børnum í tryggum viðurskiftum á uppalingarligan fullgóðan hátt - verður rokkið á bestan hátt.

Í mun til omanfyri nevnda endamál við Dagstovnaráðnum, metir Kommunufelagið, at tað eru kommunurnar, sum myndugleiki og ábyrgdarhavandi fyri innihaldinum á dagstovnaøkinum, ið eiga at meta um og gera av, hvussu ráðið best verður sett saman til tess at ráðgeva kommununum.

Um sammett verður við skipanina við Fólkaskúlaráðnum, sæst sambært fólkaskúlalógini, at:

> § 58. Landsstýrismaðurin setur eitt fólkaskúlaráð. Fólkaskúlaráðið gevur landsstýrismanninum ráð í øllum málum um fólkaskúlan. Fólkaskúlaráðið kann ráða landsstýrismanninum til at seta í verk royndar- og menningarvirksemi og granskingarætlanir viðvíkjandi fólkaskúlanum.
> *Stk. 2.* Landsstýrismaðurin tilnevnir bæði formann og ráðslimir.
> *Stk. 3.* Limirnir verða valdir fyri eitt 3 ára skeið.
> *Stk. 4.* Fólkaskúlaráðið ásetur sjálvt sína fundarskipan.
> *Stk. 5.* [1)] Mentamálaráðið er skrivstova ráðsins.

Leisturin fyri Dagstovnaráðið, ið nú er í uppskoti, fylgir hesum sama bygnaði, einasta munurin er tó, at tað í uppskotinum til Dagstovnaráð er neyvt ásett, hvussu Dagstovnaráðið skal setast saman.

Kommunufelagið tekur ikki undir við, at tað verður ásett í lógini, hvussu ráðið verður sett saman og hvør skal velja umboð í ráðið. Kommunurnar eru tilvitaðar um týdningin av síni uppgávu sambært dagstovnalógini, og fara tí sjálvsagt at velja eitt dagstovnaráð, ið á bestan hátt kann ráðgeva teimum, hvussu tær framhaldandi menna, menta og hava umsorgan fyri børnum í tryggum viðurskiftum á uppalingarligan fullgóðan hátt.

Kjarnin í uppgávuni hjá Dagstovnaráðnum er at geva fakliga ráðgeving. Tískil er eyðsæð, at tað er tann, sum hevur tørv á at fáa ráðgevingina, ið má gera av, hvønn viðkomandi metir, kann veita bestu ráðgevingina. Hinvegin bendir uppskotið um, hvussu ráðið verður sett saman á, at vandi er fyri, at onnur áhugamál enn fakliga ráðgevingin kunnu fáa ov stóra rúmd, og hetta metir Kommunufelagið er óheppið.

Viðmerkjast kann, at royndir áður hava verið gjørdar við at skipa dagstovnaráð, og sum Mentamálaráðið eisini áður hevur upplýst fyri løgtinginum í sambandi við § 52a fyrispurning, so virkaði dagstovnaráðið ikki eftir ætlan, m.a. tí at kommunurnar, sum varða av økinum, vóru ikki nøgdar við leistin, ráðið tá var skipað eftir. Vandi er fyri, at ráðið heldur ikki nú fer at virka eftir ætlan, við tí leisti, ið er skotin upp fyri, hvussu ráðið verður sett saman.

Samanumtikið metir Kommunufelagið tí, at uppskotið eigur at broytast, soleiðis at tað ikki er ásett í lógartekstinum, hvussu ráðið verður sett saman, men at tað heldur verður latið upp til kommunurnar í felag, umvegis Kommunufelagið, at manna ráðið.

§ 2a stk. 3 í uppskotinum eigur tí at verða broytt soleiðis at: *"Kommunufelagið tilnevnir ráðslimir. Ráðið skipar seg sjálvt."*

Annars er at viðmerkja, at sambært heimasíðuni hjá Pedagogfelagnum, felagið longu hevur eitt ráð, ið ber heiti "Dagstovnaráð". Fyri at sleppa undan, at bland kemur í, átti Mentamálaráðið at umhugsað at broytt heitið á Dagstovnaráðnum í lógaruppskotinum.

**Viðvíkjandi broyting í kærurætti:**

Viðvíkjandi uppskotinum um broyting í § 11 skal Kommunufelagið boða frá, at tikið verður undir við broytingini, hóast vit ikki eru samd í viðmerkingum hjá Mentamálaráðnum um rættarstøðuna á økinum.

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo

Kommunufelagið

Kommunufelagið hevur ikki aðrar viðmerkingar til uppskotið.

Vegna Kommunufelagið

Dennis Holm, formaður

Eyðun Christiansen, stjóri

**R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**